## Mentamálaráðið

# Bókhaldari

**Starvið**
Í sambandi við at eitt av okkara starvsfólkum fer í annað starv, er eitt nýskipað starv leyst at søkja sum bókhaldari í Mentamálaráðnum.
Starvið er skipað sum sjálvstøðugt starv í fyrisitingardeildini.

Høvuðsuppgávurnar eru m.a.:

- Kontering, bókhald, fíggjarstýring og eftirlit við rakstrarstøðum
- At nýta teir fíggjarstýringsmøguleikar, ið finnast í Búskaparskipan Landsins og menna slík amboð
- Luttaka í gerð av sundurgreiningum og langtíðarætlanum
- Málsviðgerð

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar hava

- Eina fyri starvið viðkomandi útbúgving og royndir á hesum fakøkinum, t.d. HH, merkonom, HD ella javnbjóðis útbúgving
- Áhuga fyri fíggjarstýring og fyrisiting
- Fyrikomandi og góð samstarvsevnir
- Evnir at kunna arbeiða sjálvstøðugt, og eisini í bólkum

**Vit bjóða**

- Eitt starv har tú sjálv/sjálvur kanst verða við til at skapa starvið
- Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við samskifti úteftir
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeiðið verður á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við starvsfólkunum í Mentamálaráðnum og stovnum tess.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um landsstýrismálaráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. juli 2002, kl. 15.00.
Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum á tlf. 35 50 50.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir - Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild umframt einari fyrisitingardeild.
Í **Fyrisitingardeildini** eru 12 starvsfólk, har er lønarstova, próvstova, móttøka, skjalagreiðsla og húsavørður umframt ein komandi bókhaldsstova. Fyrisitingardeildin er skipað við einum fyrisitingarleiðara, ið vísir til aðalstjóran.

## Til sølu

**VW Transportari 2,4 D**
hvítur, árg. 1999, koyrt 65.500 km, tvær síðuhurðar og hurðar aftan + krók. Sýnaður í 11/2001. Kostnaður kr. 170.000,- v/ mvg.

_____________

**Mercedes Benz lastbilur**
árg. 1983, sýnaður 9/2001, koyrt 72.700 km, til sølu fyri kr. 30.000,- v/ mvg.

**Tlf. 311631 / 211631**

## Skipssnikkari søkist

Søkt verður eftir royndum skipssnikkara, sum kann arbeiða sjálvstøðugt til at byrja í summar.

**Skipstimbur & aptering**
470 Eiði
Tlf. 222386

## Býráðsskrivstovan í summarfrí

Nú flestu starvsfólk fara í summarfrí, fer býráðsumsitingin í tíðarskeiðinum:

**15. juli – 16. august 2002**

bert at avgreiða tey mest neyðugu og átrokandi málini.

**Telefon- og upplatingartíðirnar** eru hvønn gerandisdag millum

**kl. 09.00–12.00**

**Tvøroyrar býráð**
Postboks 80 - FO-800 Tvøroyri
Tlf.: 371085 - 371814

## Summarfrí

Vit eru farin í summarfrí.
Vit lata upp aftur 5. aug.

**Tannlæknastovan hjá Unnur Jensen**
Varðagøta 26 - 100 Tórshavn

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3388
**Navn:** Sp/f Falkurin
**Adressa:** 480 Skála
**Kommuna:** Skála Kommuna
**Stovningardato:** 25.06.2002
**Viðtøkudato:** 25.06.2002
**Kapitalur:** Kr. 270.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 270.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Sjúrður Joensen, 480 Skála
**Stjórn:** Sjúrður Joensen, 480 Skála
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av einum stjóra
**Grannskoðari:** P/F Grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2002 - 31.12.2002
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil, ídnað ella aðra vinnu í hesum sambandi.

***Skráseting Føroya tann 26. juni 2002***

*Kristin Balle*

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

**Skrásetingar-nr.** Sp/f 3386
**Navn:** Sp/f Gunnar H. Jacobsen
**Hjánavn:** Sp/f Vestoil (Sp/f Gunnar H. Jacobsen)
**Adressa:** 350 Vestmanna
**Kommuna:** Vestmanna Kommuna
**Stovningardato:** 24.06.2002
**Viðtøkudato:** 24.06.2002
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 80.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnari:** Gunnar H. Jacobsen, 350 Vestmanna.
**Stjórn:** Gunnar H. Jacobsen, 350 Vestmanna.
**Tekningarreglur:** Felagið verður teknað av stjóranum.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2002 - 31.12.2002
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka flutning og annað starv í hesum sambandi.

***Skráseting Føroya tann 26. juni 2002***

*Kristin Balle*











*- Tað fyrsta mamma segði, tá eg segði henni, at eg var við barn, var: "Ikki eisini tú!", sigur Ansa og flennir. – Soleiðis fann eg út av, at Sigrun eisini var við barn*

# Tvíburðar áttu hvør sína dóttur við 17 døgum ímillum

**Tvíburðarnir Ansa og Sigrun av Viðareiði áttu hvør sína dóttur við einans 17 daga millumbili. Tær greiða frá barnsburðunum og hvussu tað er at báðar eiga so javngamlar gentur**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Sosialurin kemur inn í hugnaliga stovuna hjá Sigrun Niclassen, sum er gift og býr í Klaksvík. Við vindeyga stendur Ansa og hon hevur eina lítla gentu í føvninginum. Fari yvir og hyggi eftir hesu fittu gentu, og beinanvegin merki eg hendan serliga angan av nýføðingum.

- Hetta er ikki mín, hesa eigur Sigrun. Mín liggur har, sigur Ansa og peikar á sofuna, har at síggja til bert ein dýna liggur.

Fari yvir og hyggi. Og jú, undir dýnuni liggur mín sann ein lítil prinsessa afturat.

Vit sessast í sofuni og so byrja tær at greiða frá.

Ansa sigur, at hon fann út av, at hon var við barn, beint áðrenn hon og maðurin skuldu fara suðureftir ein túr. Hon gjørdi av, at ikki siga tað fyri nøkrum – uttan Sigrun sjálvandi.

- Vit fóru so suðureftir og tað gekk alt fínt. Tá vit komu aftur til Kastrup, ringdi eg heim til mammu. Beint áðrenn eg skuldi siga bei, helt eg, at eg mátti heldur siga henni, at eg var við barn. So eg segði tað. Og tað fyrsta hon segði var: Ikki eisini tú??? greiðir Ansa frá og so flenna tær báðar so hjartaliga og hyggja eymliga at báðum prinsessunum, sum tær sita við.

Framman undan eiga Sigrun og maðurin ein son, sum eitur Ólavur. Hann verður fýra ár um stutta tíð. Hinvegin er hetta fyrsta barnið hjá Ansu og manninum.

- So Sigrun var eitt slag av ráðgeva hjá mær í gjøgnum barnsburðin, tí hon hevur roynt tað áður. Tað var deiligt, sigur Ansa, sum leggur aftur at, hvussu deilig og lekkur hennara prinsessa er.

- Vit hava eisini bíðað í eini seks, sjey ár eftir henni.

Sigrun sigur, at tað hjá henni var sum at byrja av nýggjum, tí tað hesuferð var ein genta.

- Tann einasti munurin hjá okkum báðum var, at eg eigi eitt frammanundan, heldur Sigrun.

Og tíðin gekk skjótt, meðan tær vóru við barn. Ansa átti Ragnheiður tann 13. apríl og Sigrun átti Ásu tann 01. mei. Felags fyri báðar er, at tær áttu áðrenn tær vóru settar at eiga. Ansa knappar tvær vikur og Sigrun knapt eina viku áðrenn.

Mamman hjá Ansu og Sigrun kemur inn í stovuna og tekur Ragnheiður frá Ansu og fer at skifta henni.

- Mamma sigur, at tá vit báðar eru við diddunum á Viðareiði hjá henni, so er tað júst sum um hon hevur fingið tvíburðar umaftur, tí tað er so lítið í millum tær, siga Ansa og Sigrun við ein munn.

Meðan vit bíða eftir, at Ragnheiður verður skift, greiða tær báðar ernu mammurnar frá teirra fyrsta trillitúri á Viðareiði.

- Tað var at samanbera við, tá drotningin er á vitjan. Fólk komu út í móti okkum at ynskja til lukku og práta – og sjálvandi at hyggja eftir diddunum, greiðir Ansa frá.

- Og nógvastaðni komu fólk í vindeyguni at vinka, so tað var ordiliga stuttligt, leggur Sigrun afturat.

Tær siga eisini, at tær hava fingið so nógvar gávur, so hvørki Ása ella Ragnheiður koma at mangla klæðir fyribils.

Vit práta eisini um hetta at vera tvíburðar. Tær siga báðar, at hóast tær ikki eru eineggjaðar, so eru tær sera líkar.

- Vit plagdu onkuntíð fyrr at gera eina roynd, meðan vit tosaðu í telefon. Vit avtalaðu, at báðar skuldu hugsa um ein sang, og so byrja at syngja. Uttan at hin visti hvønn sang onnur hugsaði um. Og hvørja ferð, so byrjaðu vit at syngja sama sang, sigur Sigrun og smílist.

Sum systrar flestar, so eru tær sera væl, og tosa altíð saman.

- Vit siga loyndarmál fyri hvørjari aðrari, sum ongin annar veit nakað um, og soleiðis fer tað altíð at verða, sigur Ansa.

Tað er sjálvdan, at tað fer nakar dagur burtur ímillum, har tvíburðarnir ikki tosa saman. Tað gongur fyri tað mest a fyri seg yvir telefonina, tí Sigrun býr í Klaksvík og Ansa í Havn.

Nú kemur mamma teirra inn aftur við Ragnheiður, sum pjátrar eitt sindur, óivað vælnøgd, tí nú er hon rein. So fara vit at taka myndir og síðani takka vit fyri prátið.

# Froskur funnin uttan fyri Føroya Bjór

**Tá menn á Føroya Bjór komu til arbeiðis hósmorgunin og lótu hurðina, sum vendir suðureftir upp, kom ein heldur sjálvsamur kundi hoppandi inn**

*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Hesin sjálvsami kundi var ein froskur. Menninir tóku froskin og koyrdu hann í eitt glasílat við eitt sindur av vatni í.

Og beinanvegin fór onkur av teimum skemtiligu monnunum, sum starvast á Føroya Bjór at bryggja eina søgu, um hví hesin froskurin júst stóð uttan fyri dyrnar hjá Føroya Bjór hendan morgunin. Onkur helt, at tað var ikki frítt, at froskurin segði: "Væægr – Væægr"!

Ikki er greitt, hvussu froskurin er komin higar, men á Føroya Bjór halda menn, at tað er væl gjørligt, at hann er komin upp við onkrum platti. Føroya Bjór sendir ofta øl av landinum til eitt nú Føroyingafeløg í Danmark. Og so verður alt tað tóma sent upp aftur til Føroyar. Helst er froskurin komin tann vegin. Ein annar møguleiki er eisini, at hann er sloppin leysur úr onkrum akvarium í býnum, men tað er lítið sannlíkt. Men um tað er onkur, sum saknar ein frosk, so kann tað vera tann froskurin, sum í løtuni hevur góðar dagar á Føroya Bjór.



*Eitt hvørt kelidjór fær eitt navn, og menninir á Føroya Bjór hava eisini givið teirra kelidjórið, froskinum, navn: Teir vóru allir samdir um, at froskurin skal eita Óla Svend*